Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum

Evni: Kravd pensjónsuppsparing

Spurningar:

1. Hvørji krøv verða sett feløgum, ið umsita kravdu eftirlønaruppsparingina hjá føroyingum?
2. Er nakað krav um, hvørjar íløgur feløgini kunnu seta pengar í?
3. Er nakað krav um gjøgnumskygni, soleiðis at løntakarar kunnu fylgja við í, hvussu nógv tey fáa burturúr uppsparingini?
4. Eru ætlanir um at gera broytingar viðvíkjandi avkasti og gjøgnumskygni?

Viðmerkingar:
Sambært løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn, skulu øll sum ikki hava nátt fólkapensjónsaldur, og sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, spara saman til egna eftirløn. Frá 1. januar í ár er bundna eftirlønargjaldið 12 prosent av lønini.

Inngjøldini skulu, sambært lógini, fara til góðkendan eftirlønarveitara, ið hevur heimstað í Føroyum.

Í juni mánaði frættist í fjølmiðlunum, at LÍV-samtakið hevði mist 174 mió. krónur við at gera íløgur í eitt felag, sum ikki hevði megnað at tjent pengar, og at samstarvið við hetta felagið tí var steðgað. Eisini hava atfinningar verið um, at avkastið hjá føroysku pensjónsfeløgunum hevur bara verið góða helvt av tí, sum donsku pensjónsfeløgini hava havt í avkasti.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, hvørji krøv verða sett til pensjónsfeløgini hesum viðvíkjandi.

Á Løgtingi, 27. august 2026

Helgi Abrahamsen